# Tórshavnar Manskór gagnast avbera væl

**Ljóðgóskan á nýggju fløguni "Væl má gagnast" hjá Tórshavnar Manskóri er einastandandi. Tað kennist sum at sita á fyrstu parkett til eina konsert hjá kórinum, sum neyvan hevur sungið betri**

UMMÆLI
*Kári Olsen*

Herfyri gav Tórshavnar Manskór út fløguna "Væl má gagnast". Hetta er eitt vælvalt heitið, tí innihaldið má sigast at gagnast sera væl. Havi lurtað nakrar ferðir eftir fløguni, og mín meining er, at hon verður bara betri, oftari tú hoyrir hana.

Hetta sigi eg, tí at eg havi hoyrt Tórshavnar Manskor sungið fleiri ferðir, og hetta man vera tað besta, teir nakrantið hava sungið. Um tað eru mikrofonirnar og teknikkurin, sum hjálpir, skal eg ikki siga, men her syngja menninir.

Tað var einaferð onkur, sum segði, at Tórshavnar Manskór bara brúkti tvær styrkir, tá teir sungu: hart og forb.... hart. Eg gevi ikki viðkomandi rætt. Her syngur korið. Melodiirnir koma sera væl fram, væl stuðlaðir av góðum kórútsetingum sum eitt nú sangirnir, sum Heri Eysturlið hevur lægt til rættis.

Sangirnir, sum eru valdir á fløguni, eru úr gamla úrvalinum hjá kórinum. Tó er onkur sangur, sum kanska ikki hevur verið í úrvalinum hjá teimum so leingi. Her hugsi eg um sangin "Rasbojnika".

Tað kann vera, at hinir sangirnir eru valdir, tí menninir føla seg tryggar við teir.

Solosangarar eru eisini. Her er ein, sum skarar framúr, og tað er Petur H. Niclasen. Hann hevur eina klára og vakra rødd. Petur skuldi havt gjørt meira við sangin fyri árum síðani. So hevði hann verið kendur uttanfyri føroysku landoddarnar. Fróði Sandoy, Birgir Krossteig, Mouritz Mohr, Tór Verland Johansen og Andrias Reinert skulu heldur ikki gloymast. Vælvaldir solosangarar til røttu sangirnar. Eitt nú er tað altíð ein fragd at hoyra Andrias Reinert syngja negro spirituals.

So er tað ljóðgóðskan á fløguni. Og her eru vit so aftur í tí tøkniliga. Góðskan er einastandandi.

Á fløguni liggja trý ljóðløg. Eitt í vanligum stereo, eitt í "superstereo", og síðan eitt í surround. Hetta merkir, at lurtarin sjálvandi kann spæla fløguna í einum vanligum stereoanleggi, ella einum, sum kann lesa superstereo, sum Play Station 3, og at enda ber eisini til hjá lurtaranum at leggja fløguna í eitt surroundanlegg og síðani njóta fullu góðskuna av teknikkinum.

Hetta er fyrsta fløga av hesum slag, sum er givin út i Føroyum, og hetta er eydnast sera væl hjá Tórshavnar Manskóri. Njótið røddirnar koma úr teimum ymisku hátalarunum. Tað er sum at sita á fyrstu parkett til eina konsert hjá kórinum. Ja, kanska betri!

Fløguhúsin má eisini viðmerkjast. Myndin frá plattavirkinum sýnist mær heldur løgin, men vónandi er ein søga aftanfyri myndina. Eg kenni hana so ikki. Hevði hugsað mær bara onkra aðra mynd a húsanum. Eina mynd, sum sigur eitt sindur um, hvat innihaldið á fløguni er.

Nu havi eg hvørki stjørnur ella hattar at geva fløguni, men um so var, hevði eg givið 5 av 6. Hví? Hvat skal man so geva einari, sum er perfekt?

So her er bert eitt at siga: "Væl má gagnast!"







*"Væl má gagnast!" Tórshavnar Manskór – dirigentar: Bjarni Restorff og Sunleif Rasmussen.*

# Facebook bannar myndum av bróstageving

**Tað hevur fingið ilt í mong, at netstaðið Facebook tekur sær rætt til at sletta myndir av bróstageving, tí tær metast at vera ósømiligar**

BANN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hevur tú lagt eina mynd á Facebook av tær sjálvari við lítla fitta baby á brósti, skalt tú vænta, at myndin skjótt er horvin. Roynir tú at leggja myndina út aftur, verður tú mest sannlíkt strika sum brúkari á vælumtókta netstaðnum, veit tíðindastøðin Sky News at siga.



*Á Facobook verða myndir av bróstageving bólkaðar saman við ósømiligum myndum, og verða tær tí strikaðar*

### Mótmæla Facebook

Fittir, súgvandi nýføðingar ella ei - so er tað nevniliga brot á reglurnar hjá Facebook at vísa myndir av naknum bróstum.

Hetta hevur fingið ilt í nógvar kvinnur á Facebook, sum nú fylkjast í einum mótmælisbólki, ið sigst at telja meir enn 90.000 fólk. Herfyri savnaðust fleiri túsund av teimum í eini mótmælisgongu framman fyri høvuðssætið hjá Facebook í Palo Alto í Kalifornia

Sambært miðlagranskaranum Stig Hjarvard á Universitetinum í Keypmannahavn nyttar tað tó neyvan nógv at mótmæla

"Trupulleikin er, at netið er ein globalur miðil, og tey, sum reka eitt netstað, kunnu gera tað sambært sínum egnum treytum og moralskum normum. Tí mugu vit eisini vænta, at vit fyrr ella seinni verða rakt av treytum og reglum, sum koma aðrastaðni frá", sigur Hjarvard við donsku útvarpsstøðina, P3.

Facebook verjir seg við at siga, at tey onki hava ímóti bróstageving sum so. Tað eru myndirnar av naknum bróstum og bróstvørtum, sum eru trupulleikin. Hesar verða bólkaðar saman við ósømiligum myndum sum heild, ið Facebook heldur seg hava skyldu at verja sínar brúkarar ímóti.